# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## PLANETIN Í BLU-RAY

BBC hevur gjørt ein nýggja dvd-film við heitinum Nature's Great Event. Hetta er ein stórsligin náttúrufilmur um okkara jørð, og tað er ikki smávegis BBC kann fanga í einari slíkari framleiðslu. Njót flottu myndirnar á blu-ray dvd.

**NATURE'S GREAT EVENT**
dvd-filmur



## ÚTGÁVUKONSERT VIÐ EIVØR

Eivør Pálsdóttir hevur í næstu viku tríggjar konserti rí sambandi við, at hon gevur nýggja fløgu út. Fløgan kallast Larva, og og á fløguni er 11 løg, sum í stóran mun eru skrivað av Eivør sjálvari. Útgávukonsertirnar við Eivør verða 12. og 13. mai í Sjónleikarahúsinum í Havn , og 14. mai í Losjuni í Gøtu.

**EIVØR ÚTGÁVUKONSERTIR**
Havn mikukvøldið 12/5
og hóskvøldið 13/5
Gøta fríggjakvøldið 14/5



## SINGER/SONGWRITER FINALA Á KASPAR

Leygarkvøldið verður finalan í singer/songwriter kappingini, sum hevur verið hildin á Kafe Kaspar í Havn seinastu vikurnar. Finalistarnir skulu leygarkvøldið sannføra dómarar og áhoyrarar um, at teir hava uppiborið sigurin í kappingini. Í øllum førum er lagt upp til eitt gott tónleikakvøld við nøkrum væl uppløgdum singer/songwriters.

**SINGER/SONGWRITER FINALA**
Kafe Kasper í Havn
Leygarkvødið 8/5



## AGASSI SIGUR SÍNA SØGU

Hann telist millum populerastu tennisspælarar nakrantíð, men sum barn orkaði Andre Agassi ikki fyri tennis. Seinni varð hann fullkomiliga bitin av ítróttinum og gjørdist ein av heimsins bestu tennisspælarum. Agassi var eisini funnin fressur hjá slaturbløðunum, og hann var avmyndaður í øllum hugsandi støðu. Her greiðir Agassi sjálvur frá sínari søgu.

**ANDRE AGASSI**
Open: An Autobiography



## MITT Í BEATLA-RØÐ

Útvarpið hjá Kringvarpinum endursendir í hesum døgum frálíku røðina um The Beatles, sum Suni Merkistein og Pauli Magnussen gjørdu í 2000. Sendingarnar um størsta poppbólkin í søguni eru 9 í tali, og leygarkvøldið verður fimta sendingin í røðin endursend. Hetta er sending, sum bæði undirheldur og upplýsir við livandi málburði, tónleiki og samrøðum.

**THE BEATLES SENDIRØÐ**
Útvarpið
Leygarkvøldið 8/5 kl. 19.00



## TODI Á HVONN LIVE

Fríggjakvøldið bjóðar Rás2 aftur Hvonn Live. Hetta er sending við spennandi gestum, livandi tónleik, kjaki og undirhaldi. Hesaferð vitjar kendi danski poppsangarin Rasmus Seebach. Hann fer at tosa um seg og sín tónleik, og hann spælir eisini live. Millum hinar gestirnar er Todi Jónsson, sum av mongum verður roknaður sum fremsti føroyski fótbóltsspælarin nakrantíð. Hann fer at svara spurningum um at hava talent og fáa nakað burturúr tí.

**HVONN LIVE**
Rás2
Fríggjakvøldið 7/5 kl. 20.00

## DAGURIN HJÁ MAMMU

Sunnudagin er mammudagur, og tá plaga synir og døtur at hugsa um mammuna. Fleiri keypa onkra minni gávu, sum skal gleða mammuna, og onnur eru helst meira uppfinnsom enn tað. Í øllum førum er høvi – um enn tað mann liggja ein handilsligur tanki aftanfyri – at markera dagin hjá mammu.

**MAMMUDAGUR**
Sunnudagin 9/5